## Ferja sum sjúkrahús

Tey, sum plagdu at ferðast tvørtur um Stótabelti í Danmark, áðrenn tað fasta sambandið kom, vóru kanska onkran túrin við ferjuni „Dronning Ingrid“. Men hana sleppa tey neyvan at síggja aftur. Í gjár kom ferjan til Monrovia í afrikanska landinum Liberia, har hon skal virka sum sjúkrahússkip. Kristni hjálparfelagsskapurin Mercy Ships eigur nú skipið, sum er umbygd til sjúkrahússkip við 80 seingjarplássum og skurðstovum.

## Dýrir óvanar

Ósunnur matur og vantandi rørsla kosta tí danska samfelagnum ovurhonds nógvar pengar. Sambært einari nýggjari frágreiðing kostaði ovurfiti samfelagnum 14,4 mia. krónur í 2004. Umleið 750.000 verða roknaðir sum ovurfeitir, og teir kosta samfelagnum nógv, tí teir eru oftari sjúkir enn onnur. Heilsumálaráðið, sum hevur skrivað frágreiðingina, ger vart við, at útreiðslur til heilivág og læknavitjanir eru ikki taldar við.

Heðin Mortensen:

## – Áttu at boða frá

**– Ein og hvør má hava loyvi at umvæla síni hús og tann dagin, tá handilskjarnin skal gera umvælingar, so fáa teir sjálvandi loyvi til tað, sigur Heðin Mortensen, nú ein krani forðar ferðsluni gjøgnum miðbýin. – Men sjálvandi áttu tey vit at boða frá, sigur hann**

HANDILSLÍV

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hans Waag, eigari og stjóri í Handilskjarnanum, gevur aðrastaðni á síðunum ilt av sær, nú ein krani, sum hjálpir Føroya Banka at skifta vindeygu, forðar ferðsluni gjøgnum býin. Hann finst at býráðnum, sum hevur givið loyvi til hetta, uttan at tikið handlarnar við upp á ráð.

– Sjálvandi eiga vit at boða frá, og spyrja handlarnar eftir, sigur Heðin Mortensen, sum soleiðis tekur í egnan barm.

– Men ein og hvør má sleppa at umvæla síni hús, og skal Føroya Banki skifta vindeygu, so mugu teir sleppa tað. Vit vilja gera tað so trivaligt í býnum sum gjørligt fyri øll, eisini handilslívið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Hann er á ongan hátt samdur við eigaran av handilskjarnanum, um at handilslívið í býnum ongan góðan eigur í býráðnum.

– Nei, tað passar ikki sum Hans Waag sigur har, og hann er eisini vælkomin oman til mín at tosa við meg um hetta, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann kann eisini upplýsa, at drúgva arbeiði í gongugøtuni verður liðugt í seinasta lagi um tvær vikur.

# Eingin ferðsla gjøgnum miðbýin

**Ein stórur krani forðar fyri, at bilar kunnu koyra gjøgnum miðbýin, og tað gongur út yvir handilslívið. Býráðið hevur givið loyvið til hetta, men hevur ikki tikið handlarnar við upp á ráð. – Hetta er enn eitt dømi um, at handilslívið í miðbýnum eigur ongan góðan í býráðnum, Hans Waag, eigari og stjóri í Handilskjarnanum**

HANDILSLÍV

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Føroya Banki skiftir vindeygu í deild síni í miðbýnum í Havn. Til at gera hetta arbeiði hava teir fingið ein krana at hjálpa sær. Men hesin stóð í gjár fyri innkoyringina til Steinagøtu, sum er einasti vegurin, ið førir framvið eitt nú Telebúðini og Handilskjarnanum.

Býráðið hevur givið loyvi til hetta arbeiði, men hevur ikki tikið handlarnar við upp á ráð, og tað ilskast eigarin og stjórin í Handilskjarnanum, Hans Waag, um.

– Tað stendur ein maskina og blokerar soleiðis, at eingin ferðsla sleppur gjøgnum býin, og tað merkist sanniliga aftur, sigur Hans Waag, sum ikki bert er argur um hetta, men eisini tað, at handlarnir ikki eru tiknir við upp á ráð.

– Eingin er kunnaður um hetta, men býráðið hevur bara givið loyvi til hetta, og tað er enn eitt dømi um, at handilslívið í miðbýnum ongan góðan eigur í býráðnum, sigur Hans Waag. Hann heldur, at tað hevði verið upp á sítt pláss, um handlarnir vórðu hoyrdir um hetta.

– Ella at vit fingu at vita, at tann og tann dagin verður tað soleiðis, sigur Hans Waag, sum harmast um, at hetta arbeiði, sum forðar ferðslu gjøgnum miðbýin, verður gjørt í dagtímunum.



*Ein stórur krani uttan fyri Føroya Banki forar ferðsluni gjøgnum miðbýin*

Vinnuhúsið staðfestir:

## Semjan millum YFF og AFF endalig

**Í viðtøkunum hjá YFF stendur, at limafeløgini skulu góðkenna sáttmálar innan 48 tímar eftir, at semja er gjørd. SFS hevur ikki boðað frá, at tað ikki kann góðtaka semjuna**

SEMJA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at semjan millum Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum (AFF) og Yrkisfelagið fyri Fíggjarstovnar í Føroyum (YFF) ikki er endalig, tí limirnir í Starvsfólkafelag Sparikassanna í Føroyum (SFS), sum er limur í YFF, ikki hava góðtikið sáttmálan.

Men hetta undrast Vinnuhúsið um, at ivi verður sáddur um gildið av sáttmálunum millum AFF við YFF.

- SFS hevur á aðalfundi samtykt at lata YFF rættin at samráðast vegna seg. Í viðtøkunum hjá YFF stendur, at sáttmálar skulu góðkennast av limafeløgunum innan 48 tímar eftir, at semja er undirskrivað. SFS hevur ikki boðað frá, at tað ikki kann góðtaka semjuna, sigur Vinnuhúsið.

Tað, at SFS ikki hevur boðað frá, at tað ikki góðtekur semjuna verður tískil tulkað sum, at tað tekur undir við henni.

Nevndin í SFS hevur tískil góðkent semjuna mótvegis YFF, sum aftur hevur góðkent hana mótvegis AFF. Løgfrøðiliga er tí ongin ivi um, at semjan hevur rættarligt gildi, verður sagt úr Vinnuhúsinum.


www.husamekling.fo
Húsamekling
Keyp og søla av fastari ogn tel 31 93 21



**Vesturgøta 1, Tórshavn**
Stødd á húsum: 142 m² + úthús
Stødd á grundøki: 110 m²
Byggiár: 1985
Prísuppskot: Kr 1.800.000,-



**Bjarnoyarvegur 12, Tórshavn**
Stødd á húsum: 86 m² + loft
Stødd á grundøki: 320 m²
Byggiár: 1971
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



**Reynsgøta 7, Argir**
Stødd á húsum: Kj.: 100 m², miðh.: 100 m² + hjall
Stødd á grundøki: 525 m²
Byggiár: 1983
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



**Hvarvið 3, Tórshavn**
Stødd á húsum: 109 m² x 2 + Hjall
Stødd á grundøki: 448 m²
Byggiár: 1967
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



**Torkilsgøta 8, Hoyvík**
Stødd á húsum: 104 m² + loft á uml. 80 m²
Stødd á grundøki: 248 m²
Byggiár: 2001
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



**Eiriksgøta 12, Tórshavn**
Stødd á húsum: 100 m² + hjall
Stødd á grundøki: 240 m²
Byggiár: Uml. 1952
Prísuppskot: 1.800.000,-